# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Aftur á kósina

CEH skútan er komin aftur á kósina, og við hesum endaði so enn ein partur av tí margháttliga politiska glantrileiki, sum ein undrandi tjóð hevur verið áskoðari til nú í fleiri vikur. Løgmaður velur enn einaferð at royna minnilutasamgongu við Sjálvstýrisflokkinum sum stuðulsflokki. Við hesum er Sjálvstýrisflokkurin farin inn aftur í sín gamla leiklut sum kittið í føroyskum politikki.

Tað er ikki torført at síggja, hvat ið stygdi teir stóru andstøðuflokkarnar burt. Teir fingu ikki reina talvu, og verandi samgongustøði er sjálvsagt ov radikalt til hesar flokkar. Nú verður so stýrt eftir upprunaliga stjórnargrundarlagnum, CHE samgonguskjalinum. Skal hetta skjal við blokkniðurskurði, stórum ætlanum og samfelagsbroytingum, fremjast í verki, so letur hetta seg valla gera uttan skatta- og avgjaldshækkingar og/ella skerjingar innan almenna sektorin. Til heystar, tá fíggjarlógin skal gerast, kemur minnilutasamgongan at standa sína roynd. Tað verður spennandi at síggja, um Sjálvstýrisflokkurin fer at vilja rinda prísin fyri sín part av valdinum. Landsstýrisfólk hava meldað út, at við komandi fíggjarlóg skulu vallyftini hjá samgonguflokkunum innfríast. Hetta kann valla fremjast við verandi inntøkustøði, og hetta má so alt annað líka koma at merkjast hjá borgaranum. Henda støða merkir ongan politiskan trupulleika fyri Tjóðveldi og Miðflokk, tí veljarar teirra vita, at tann politikkur, teir stuðla, merkir øktar fíggjarligar byrðar, um almenna tænastustøði skal varðveitast.

Hjá Javnaðarflokkinum er støðan ikki so einføld, og spurningurin er, hvørt hansara veljarar yvirhøvur taka undir við tí politikki, sum er settur út í politiska kortið við CHE skjalinum. Flokkurin er ikki loysingarflokkur, og tí kann tað hugsast, at veljarar floksins eru ivandi um CHE projektið. Í gjár varð upplýst, at tað í meðal er vorðið 3000 kr. dýrari um mánaðin at liva hjá einum vanligum húsarhaldi. Føroyskir pensjonistarnir eiga illa nokk fyri mat, og eingi tekin eru um, at samgongan hevur nakra ætlan um at lætta teimum um gerandisdagin. Javnaðarflokkurin skuldi verið verjin hjá teimum samfelagsbólkum, ið nú verða raktir av øktum livikostnaði. Kann tað ikki hugsast, at tað er her ein orsøkin til minkandi undirtøku Javnaðarfloksins skal finnast. Ein so stór afturgongd, sum tann seinasta veljarakanningin avdúkar, kann valla forklárast bert við at vísa til klandrið innanfloks. Tað er væl skiljandi, at løgmaður og formaður Javnaðarfloksins forklárar afturgongdina út frá klandrinum innanfloks. Men er hetta ikki er at undirmeta egnar veljarar og almenning? Løgmaður hevur við at velja minnilutasamgonguna átikið sær eina stóra og trupla uppgávu: hann skal tryggja ein politikk, sum Tjóðveldi, Miðflokkur og Sjálvstýrisflokku kunnu góðtaka, samstundis sum hann skal fáa tey fráfalnu í egnum fylgi aftur í rætt. Eingin øvundaverd støða!

**Sosialurin**

## Sláið nú kalt vatn í blóðið



**EYÐGUNN SAMUELSEN**
tingkvinna

Tykist mær, sum menn nú allir loypa á bláman, nú fíggjarmálaráðharrin fer at viðgera spurningin um blokkniðurskurðin í samgonguni. Hetta er ein fyrireiking til tilmæli, ið danska stjórnin á hvørjum ári fær um støddina á blokkinum. Hetta tí at stjórnin skal seta upphæddina á teirra fíggjarlóg, ið verður løgd fram í oktober mánaði.

Eg vil enn einaferð minna á, at henda samgongan hevur bundið seg til at reka ein ábyrgdarfullan fíggjar- og búskaparpolitik, har lagt verður upp fyri sveiggjum í búskapinum og neyvt tamarhald er á øllum útreiðslum. Eisini hava vit semju um, at øll politisk átøk eru bundin at búskaparstøðuni.

Mín áheitan er, at vit fara undir at viðgera okkara egnu fíggjarlóg fyri 2009 og hyggja at, hvussu hon kann fáast at hanga saman við øllum teim ætlanum, ið henda samgongan hevur.

Vit hava eisini ásetingina um blokkniðurskurð í samgonguskjalinum, men hon er bert ein partur av heildini, og tann ásetingin er eisini bundin at fíggjarstøðuni. Lat okkum viðgera alla heildina í samgonguni og ikki í fjølmiðlunum.

Vit hava eina rúgvu av málum, eitt nú á almanna- og heilsuøkinum, ið vit hava sett okkum fyri at fremja í hesum samgonguskeiðnum. Eg kann nevna mvg av frukt og grønt ella hægri barnafrádrátt, framhaldandi útbygging av eldraøkinum, so tørvurin á búplássum verður nøktaður, eftirløn til øll og hægri pensión til tey, ið ikki hava aðra inntøku. Hesi mál, kundi nevnt fleiri, eitt nú innan útbúgving og gransking, hava líka so stóran týdning sum spurningurin um blokkin. Javnaðarflokkurin ynskir eina heildarviðgerð av hesum spurningunum og fer ikki einvíst at ganga við til at minka blokkin, um hetta merkir, at aðrir týdningarmiklir vælferðarágóðar ikki kunnu fremjast.

## Ikki eingang urtagarðar fáa frið



**JØRGEN NICLASEN**
formaður
Fólkafloksins

Hendan samgongan er komin heilt út í august mánað og eru politisku garðarnir langt frá seyðahøgum standi, tí er so lítið skil á.

14. mai er regluligt at garðarnir skulu vera í seyðahøgum standi. Hettar fyri at skil skal vera á hvar ið seyðurin er og fyri at sleppa undan hundalívi í bygdini. Hendan samgongan er komin heilt út í august mánað hevur framvegis ikki fingið politisku garðarnar í seyðahøgan stand.

Men hevur í dag staðfest at tað ger einki, um nakað skil er í. Bara vit sita víðari. Úrslitið verður sum vit kenna tað. Ikki so frætt, sum urtagarðar fáa frið.

Samgongan hevur staðfest, at tað ikki er meiriluti fyri politikkinum, tað er ikki meiriluti fyri teirra samgonguskjali. Men tað er meiriluti fyri persónarnir skulu sita. Og tað tykist meira umráðandi enn politikkurin. Fiskivinnupolitikkurin var fríggjadagin feldur av Løgtinginum. Landsstýrismaðurin í Fiski- og Tilfeingismálum hevur lagt uppskot fram um at forkoma landbúnaðarvinnuni. Í Løgtinginum er greitt komi fram, at málið hevur onga undirtøku.

Næsta fráboðaða máli er blokkstuðulin, eisini rúkandi ósemja. Tó er semja um at gera fíggjarlóg, men ongin semja um hvat skal standa í henni. Eingin ivi um, at fólk skulu knokkroytast við skatta-og avgjaldshækkingum. Vit fáa eitt framhaldandi eljustríð, sum ábyrgdarfullir politikkarar ikki áttu at staðið model til. Okkara innilliga áheitan er framvegis, at reinsa luftina við at gera nýggja samgongu við politikki sum ber.

## Takið tykkum saman og farið til arbeiðis



**JÓNA MORTENSEN**

Tað økir ikki um trúðvirið á tí polittiska økinum, tá ein eyggleiðir skilið. Síðani 19. januar er akkurát einki komið burturúr av tí, sum hesi fólk vóru vald inn uppá. Hópatal av lyftum um, at nú skuldi vend koma í.

Tað bleiv skrivað síða upp og síða niður, at um hesi vælsignaðu fólk komu inn, skuldi eingin verða noyddur at flyta av landinum. Serliga ikki tey, sum høvdu verið við sviðusoð, t. d einligar mammur, familjur, ið høvdu børn við serligum tørvi. Eisini skuldi setast á stovn náttarvaktarskipan til eldri heimabúgvandi. Ja tað var ikki orð fyri, hvussu pragtfult alt fór at verða.

Hvat hava vit sæð síðani valið?

Stórar smádreingir sum hava klandrast og keglast. Stórar smádreingir, sum absolut í mínari verð síggja út til at hava "serligan tørv" eru so sjúkir fyri at verða í sentrum, at teir gloyma, at teir skulu arbeiða fyri fólkinum og ikki fyri sær sjálvum.

Hótta aðru hvørja løtu við at leggja frá sær, um teir ikki fáa sín vilja. Ja so var tað ikki soleiðis meint allíkavæl, men bara líka sum eitt slag í krígstrummurnar. Hattar er flóvisligt. Takið tykkum saman og byrjið at arbeiða við tí, sum tit vóru vald/valdir inn uppá. Ella leggið frá tykkum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.